

# Sansir søkja **internetráðgeva**

Tú skalt ráðgeva kundum okkara í netbaseraðum loysnum so sum heimasíður, portalar og serloysnir innan KT. Tú verður prosjektleiðari og kemur at standa fyri spennandi samskiftisuppgávum, sum tú skalt loysa saman við kundunum og okkara dugnaligu starvsfólkum. Hetta merkir, at tú kemur at taka tær av ráðgeving og interaktiónssniði umfram samstarvi við sniðgevar og forritarar.

Tú skalt selja professioneller heildarloysnir, sum byggja á okkara framkomna og brúkaravinarliga CMS, Sansir.net. Heildarloysnirnar fevna um ráðgeving, interaktiónssnið, grafiskt snið og implementering á Sansir.net. Tað verður tín ábyrgd at tryggja, at loysnirnar, vit skapa fyri okkara kundar, eru góðar og taka støði í mentanini og samleikanum hjá kundunum.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú eina kandidat- ella bachelorútbúgving innan kunningarvísind, miðlar ella samskifti, ella tú hevur hollar royndir við netbaseraðum loysnum og CMS. Tú hevur lætt við at samskifta við fólk, tú dugir væl at hugsa í heildarloysnum, hevur gott eyga fyri visuellum samskifti og natúrlig evnir fyri handli. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og leiða tíni prosjekt, samstundis sum tú dugir væl at samstarva við tínar starvsfelagar.

Sansir eru ein framfýsin samskiftisfyritøka við 40 starvsfólkum í trimum ymiskum londum. Av hesum arbeiða 11 fólk burturav við serloysnum til internetið. Vit skapa kunningar- og marknaðarføringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum vilt skapa framtíðina hjá Sansum saman við okkum. Sjálvandi fært tú eina góða løn.

Umsóknin skal sendast við telduposti til Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo ella Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo. Vinarliga viðmerk títt fartelefonnummar.

Vit skulu hava umsóknina í seinasta lagi kl. 16.00 mánadagin 7. apríl. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Lenu L. Mohr á tel 238353 ella Høgna Rasmussen á tel 238351. Vinarliga ring millum 15.00 og 18.00. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Lenu ella Høgna.

SANSIR

Pf. Sansir
Dvørgastígur 7

Postmoga 1099
FO-110 Tórshavn

www.sansir.fo

**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**







**IKKI GERA IKKI NAKAÐ**

1 Tað er bíligast og best at gjalda skuldina alt fyri eitt.

2 Fært tú ikki goldið, men væntar at fáa pening skjótt, kanst tú seta teg í samband við okkum og fáa longda gjaldsfreist.

3 Fært tú ikki goldið alt í senn, kanst tú seta teg í samband við okkum og gera avtalu um, hvussu skuldin skal gjaldast.

4 Rindar tú rættstundis, áðrenn ásettu gjaldsfreistina, ella heldur tú avtaluna, hækkar innheintingarkostnaðurin ikki.

5 Tørvar tær nærri upplýsingar um innheintingarmál, kanst tú altíð seta teg í samband við okkum, og vit skulu gera tað, sum vit eru ment, at leiðbeina tær.

intrum justitia

N.Finsensgøta 13 · FO-100 Tórshavn
Tel. +298 357 357 · Fax +298 357 350